# Hans Fróði aftur við

*Føroyski verjuspælarin kom í 5-2 sigrinum a HamKam. Kurt Mørkøre skeyt tvey av málunum*

Jákup Mørk

Fyri fyrstu ferð í ár var Hans Fróði Hansen at síggja í dysti fyri besta liðið hjá norska felagið sínum, Sogndal.

Tá tað restaðu 18 minuttir av dystinum, varð føroyski verjuleikarin sendir á vøllin. Dysturin var tá at kalla avgjørdur, við tað at Sogndal longu tá var á odda 4-2, og stutt fyri leiklok fyri Sogndal enn eitt mál, soleiðis at endaliga støðan gjørdist 5-2.


*Fyri fyrstu ferð, síðani triðja brotið í óstbeininum, var Hans Fróði Hansen aftur í dysti fyri norska Sogndal*

**Kurt tvey mál**

Sogndal fekk annars ringast hugsandi byrjan í dystinum, tá heimaliðið kom á odda longu eftir tveimum minuttum. Hetta fekk tó ikki teir á føroyska liðnum at falla í fátt, og áðrenn hálvleiksteðgin hevði Sogndal skotið fýra mál, harav tvey teirra vóru frá Kurt Mørkøre. Hini bæði hevði álopsfelagin, Alexander Ødegaard skotið, og hann skeyt eisini fimta málið hjá Sogndal.

Triði føroyski leikarin hjá Sogndal, Julian Johnsson, var við í allar 90 minuttirnar, og var hann við í uppspælinum til 1-1 málið, eins og hann við støðuni 4-1 spældi Kurt Mørkøre frían, uttan at hetta tó gav úrslit. Harumframt hevði Julian sjálvur eina góða roynd, tá fyrri hálvleikur var um verða hálvrunnin.

Við sigrinum vann Sogndal seg upp á fimta plássið í næstbestu norsku deildini.

# Leiftur misti í evstu løtu

*Seinastu 10 minuttirnar mistu Leiftir trygga 2-0 leiðslu*

Jákup Mørk

Tá ein tími var leiktur av Inter-Toto dystinum hjá Leiftri móti sveisiska Lüzern, var lagið gott á Ólafsfirði.

Miðskeiðis í fyrr hálvleiki hevði Jens Erki Rasmussen nevnliga sent fríspark beinleiðis í málið, og tá 10 minuttir vóru leiktir av seinna umfarinum, økti brasiliumaðurin, Santos, um leiðsluna.


*Jens Erik Rasmussen skoraði fyrsta málið Leiftri við beinleiðis frísparki*

**Mistu í 10 minuttir**

Leiftursmenn vóru sostatt á sigurskós, og líkt var til, at dysturin var komin væl og virðiliga undir land.

Um tað var orsakað av, at leikararnir nú tóku sær av løttum, skal ikki sigast, men seinastu 10 minuttirnar av dystinum, eydnaðist tað mótstøðuliðnum at skjóta tvey mál, soleiðis at javnleikur gjørdist endaliga úrslitið.

2-2 javnleikurin hevur sjálvandi við sær, at útgangsstøðið hjá føroyska liðnum nú er munandi verri, enn tað hevði verið við einum 2-0 sigri.

Skal Leiftur vinna seg víðari í kappingini, er nú neyðugt hjá teimum at skora í Sveis.

Sum skilst í íslendsku fjølmiðlunum, so var málverjin og venjarin hjá Leiftri, Jens Martin Knudsen, alt annað enn nøgdur við fyrra málið hjá gestunum.

Føroyski landsliðsmálverjin helt eftir dystin, at hann átti fríspark, tá sveisiska liðið skoraði eftir horna, men dómarin lat kortini ikki við seg koma, men góðkendi málið.

Seinni dystirin móti Lüzern verður komandi leygardag.

# FCK fekk ikki Tivoli

*Tað gjørdist ikki FCK, sum fór avstað við vørunhi, tá Tivoli herfyri varð selt*

Jákup Mørk

Fyri nøkrum mánaðum síðani hoyrdist, at felagið hjá Toda Jónssyni, FCK, taldist millum teirra, sum høvdu áhuga í at keypa Tivoli í danska høvuðsstaðnum.



**Gekk ikki**

Um nakað hevur verið um tosið, fekst ongantíð váttað, men donsku fjølmiðlarnir vildu vera við, at tað var nær við at eydnast fótbóltsfelagnum at keypa stóran part av partabrøvunum, og soleiðis víðka enn meira um virksemið sítt.

Tá samanum kom, gjørdist tað Skandinavisk Tobakskompagni og Chr. Augustinus Fabrikker, sum keypti partabrøvini. Seljari var Carlsberg, og samlaði parturin av partapeninginum hjá nýggju eigarunum er43,43%. Keypsprísur: 308 mió.kr.

**Nýggjan venjara**

Annars fræ私ttist fyrrapartin í gjár, at leiðslan í FCK nú hevur gjørt av, hvør skal verða hjálparvenjari hjá bretanum, Roy Hodgson.

Talan verður um 52 ára gamla Colin Toel. Eins og Hodgson er Toel breti, og teir báðir hava samstarvað í fleiri átløgum undanfarnu árini. Umframt at hann hevur virka sum leikari hjá Wimbledon og venjari hjá IFK Norrkøping, hevur Coel nevnliga virkað sum hjálparvenjari hjá Hodgson í bæði Halmstad og Bristol City.

# Óli til Danmarkar

*Um eina viku setir Óli Johannesen aftur kósina móti Århus, har málið er at vinna sær sess á besta liðnum hjá AGF*

Jákup Mørk

Tað vakti ans í føroyska fótbóltsheiminum, tá TB fyrst í mei mánaði gjørdi avtalu við AGF og Óla Johannesen um, at verjuálitið hjá landsliðnum fyrru kappingarhálvu skuldi styrkja um TB liðið.




**Hevur hjálpt**

At Óli veruliga hevur styrkt um liðið hjá TB, man lítil ivi vera um.

Leikliga var hann kanska ikki so væl fyri fyrstu dystirnar, tí hann júst var byrjaður at venja aftur, eftir at hava havt knæskaða. Hinvegin eigur sálarligi týdningurin av hesum ikki at undirmetast, tí bara tað at hava ein slíkan leikara á liðnum, er ein stór hjálp hjá hinum leikarunum.

Seinastu dystirnar er landsliðsmaðurin so eisini farin at vísa leikligu dygdirnar, og spurdu tú aðru deildarleikararnir hjá KÍ eftir dystin leygardagin, var eingin ivi um, hvør var besti spælarin á vøllinum.

**Eingin summarfrítíð**

TB hevur sostatt havt gleði av fótbóltsevnunum hjá Óla seinastu átta dystirnar, og og eftir at níggjundi og seinasti dysturin í fyrru kappingarhálvur er leiktur komandi vikuskifti, gongur leiðin aftur til Danmarkar.

Har hava liðfelagarnir hjá Óla nú havt frí í tríggjar vikur, og fyrireikingarnar til komandi kappingarár eru longu farnar ígongd.

Fyrsti dysturin í superliguni verður longu 23. juli, so tað verður so sum so við frítíðini hjá Óla í summar.

Hetta tykist tó ikki nerva Óla. Mál hansara er framvegis at vinna sær fast pláss á superliga liðnum, og betri venjingarstøðan er, betri áttu møguleikarnir fyri hesum at verið.



# EURO 2000 endaspælið

## Bólkur A

**Rumenia-Portugal 1-0 (0-0)**
1-0:

**Ongland-Týskland 1-0 (0-0)**
1-0: Shearer

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Portugal | 2 | 0 | 0 | 4-2 | 6 |
| 2 Ongland | 1 | 0 | 1 | 3-3 | 3 |
| 2 Týskland | 0 | 1 | 1 | 1-2 | 1 |
| 3 Rumenia | 0 | 1 | 1 | 1-2 | 1 |

**Komandi dystir:**

20.06 Ongland-Rumenia

20.06 Portugal-Týskland

## Bólkur B

**Svøríki-Turkaland 0-0**

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Italia | 2 | 0 | 0 | 4-1 | 6 |
| 2 Belgia | 1 | 0 | 1 | 2-3 | 3 |
| 3 Svøríki | 0 | 1 | 1 | 1-2 | 1 |
| 4. Turkaland | 0 | 1 | 1 | 1-2 | 1 |

**Komandi dystir:**

19.06 Turkaland-Belgia

19.06 Italia-Svøríki

## Bólkur C

**Slovenia-Spania 1-2 (0-1)**
0-1: Raul 4.
0-2:
1-2: Zahovic

**Noreg Jugoslavia 0-1**
0-1:

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Jugoslavia | 1 | 1 | 0 | 4-3 | 4 |
| 2 Noreg | 1 | 0 | 1 | 1-1 | 3 |
| 3 Spania | 1 | 0 | 1 | 2-2 | 3 |
| 4 Slovenia | 0 | 1 | 1 | 4-5 | 1 |

**Komandi dystir:**

21.06 Jugoslavia-Spania

21.06 Slovenia-Noreg

## Bólkur D

**Kekkia-Frakland 1-2 (0-1)**
0-1: Henry
1-1: Nedved (br.)
1-2:

**Danmark-Holland 0-3 (0-0)**
0-1: Kluivert
0-2: F. De Boer
0-3: Zenden

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Frakland | 2 | 0 | 0 | 5-1 | 6 |
| 2 Holland | 2 | 0 | 0 | 4-0 | 6 |
| 3 Kekkia | 0 | 0 | 2 | 1-3 | 0 |
| 4 Danmark | 0 | 0 | 2 | 0-2 | 0 |

**Komandi dystir:**

21.06 Danmark-Kekkia

21.06 Frakland-Holland

# Nú er nóg mikið

*Europeiska fótbóltssamgongan, UEFA, hóttir við at vísa enska landsliðnum durafjórðingin*


*Hollendingar fegnast, meðan Danmark sleikir sárini*

Jákup Mørk

Ófriðarkropparnir, sum fylgja enska landsliðnum, teir sonevndu hooligans, hava nú fingið eina seinastu ávaring frá UEFA. Lennart Johansen, UEFA forseti, segði eftir ein kreppufund sunnudagin, at verður rok orsakað av ensku áskoðarunum, tá Ongland og Rumenia spæla avgerandi dystin sínámillum týskvøldið.

**Hava ikki gloymt**

UEFA forsetin segði millum annað, at UEFA ikki vil standa inni fyri tí atburðinum, sum ensku áskoðararnir hava víst, tær báðar ferðirnar, sum enska landsliðið higartil hevur spælt.

- Vit kunnu ikki taka ábyrgdina av, at fólk møguliga verða dripin, segði Johansen millum annað. Víðari segði hann: - Eg vóni, at hooligans fata, hvat teir gera móti landi sínum. Vit kunnu ikki gloyma Heysel vanlukkuna, ella avnoktað tað, sum hendi í Istanbul, Keypmannahavn og nú í Bruxelles og Charleroi.

**Enn eitt bann**

Við hesum er líkt til, at enska landsliðið er um at fáa somu viðferð, sum ensk fótbóltsfeløg fingu eftir Heysel vanlukkuna, tá enskur fótbóltur varð bannaður europeiskari luttøku í fimm ár.

Einki er at taka seg aftur í, at hetta var til stóran skaða fyri bretskan fótbólt, og tað er ikki fyrr enn nú, at ensk feløg veruliga eru farin at gera um seg í europeiskum høpi.

Eitt líknandi bann fyri landsliðið, hevði helst havt við sær, at enskur fótbóltur var fyri einum enn størri afturstigið. Einum afturstigið, sum landið als ikki hevur ráð til, um hugt verður at avrikunum seinnu árini.

**Blair samdur**

Enski stjørnarleiðarin, Tony Blair, var samdur í Johansen, og hann vónaði eisini, at stigið hjá UEFA kundi vera fáa ørvitisknokkarnar at rakna við, soleiðis at teir ikki longur gjørdu Onglandi fyri skommum.

**Aðrir EM-stubbar**

Hóttanin frá UEFA um at tveita enska landsliðið úr kappingini, hevur eisini fingið spælararnar á enska liðnum at heita á áskoðararnar um at skikka sær betri.

Leikararnir eru á einum máli um, at støðan er sera álvarslig, og at hetta eigur at verða steðgað nú.

**Hoddle fegin**

Fyrrverandi enski landsliðsvenjarin, Glen Hoddle, var ovurfegin um enska sigurin á Týsklandi.

Hann rósti ensku leikarunum fyri stríðsviljan, sum var størsta orsøkin til sigurin, og eisini rósti hann Kevin Keegan fyri at vera sera beinraknan við útskiftingum sínum, sum Hoddle heldur vórðu gjørdar júst í røttu løtunum.

**Hagi stúrir**

Rumenska tjóðarhetjan, Gheorghe Hagi, er bangin um, at tíð hansara á landsliðnum nú er runnin út. Hagi fekk gult kort í dystinum móti Portugal, og er tískil leikbannaður, tá Rumenia skal spæla avgerandi dyst móti Onglandi.

Hagi hevur áður boðað frá, at hann gevst á landsliðnum eftir EM-endaspælið, og um Rumenia ikki vinnur á Onglandi, er kappingin liðug fyri teirra viðkomandi.

Serliga keddur er hann um, at dómararnir ikki vilja lata tey lítlu londini spæla við í EM. – Eg fekk eitt gult fyri einki, men hatta er luturin hjá smáu fótbóltstjóðunum, segði ein vónbrotin Hagi.

**Rijkaard endiliga glaður**

Eftir hollendska 3-0 sigurin á Danmark, helt hollendski landsliðsvenjarin, Frank Rijkaard, endiliga, at hann hevði orsøk til at smílast.

Undan dystinum hevði hann funnist at leikarum sínum, tí teir tóktust meira áhugaði í korstpølum heldur enn mótstøðuliðunum, men nú hevur hann tikið alt hetta aftur.


*Shearer fagnar áskoðarunum eftir sigurin á Týsklandi. Somuáskoðarar kunnu nú gera, at Ongland verður sent heim í úrtíð*

# Munur kemur í

*Nú gerst alt meira greitt. hvørji lond koma víðari úr bólkaspælinum*

Jákup Mørk

Nú øll londini hava spælt tveir dystir, er myndin av fjórðingsfinalunum um at gerast alt meira greið.

**Fýra eru klár**

Undan seinastu dystunum hava fýra lond longu tryggjað sær sess í fjórðingsfinaluni, og av hesum er tvey, sum eru vís í at vinna sín bólk.

Tey bæði eru Porturgal og Italia, meðan Frakland og Holland enn skulu avgera sínámillum, hvør teirra vinnur sín bólk.

Hinvegin eru tað nú tvey lond, sum ongan møguleika hava at koma víðari.

Danmark er tað landið, sum higartil hevur staðið seg ringast, og eftir fyrstu dystirnar hava danir einki stig fingið, og málúrtøkan er 0-6. Kekkar koma heldur ikki longur hesu ferð. Eins og danir, hava teir verið við undirlutan móti Fraklandi og Hollandi, tó at munurin í báðum førum bert hevur verið eitt mál.

**Hendingaríkt**

Talan hevur annars verið um eitt sera hendingaríkt vikuskifti, har fótbóltssvangir hyggjarar í ríkjuligt mát eru mettaðir. Fyri eina løtu í øllum førum.

Noreg kom niður aftur á jørðina, tá teir í einum ljótum, dysti máttu lúta fyri jugoslavum.

Ongland vann fyrsta sigurin á Týsklandi í einnum endaspæli í samfull 34 ár. Seinasti sigurin viðførdi, at Ongland vann HM-heitið, og bjartskygdu onglendingarnir vóna, at søgan nú fer at endurtaka seg.

Lítla Slovenia, sum flestu roknaðu við varð sent beinleiðis heim, hevur higartil staðið seg ovæntað væl, og sunnudagin var um reppið, at teir eisini fingu stig frá Spania.

Uumframt góðu úrslitini, hevur Slovenia eisini annan av toppskjúttunum í kappingini. Zahovic hevur nevnliga eins og Milosevic hjá Jugoslavi skotið trý av teimum fýra málunum, sum land hansara hevur fingið í endaspælinum.

**Ikki alt er líka gott**

Hóst talan í stóran mun hevur verið um eitt sera áhugavert endaspæl, við álopsfótbólti í hásætinum, so eru koritni lutir, sum ein kundi ynskt øðrvísi.

Ógvusligasta av hesum er hooliganisman, sum enn einaferð hevur gjørt um seg. Sum vanligt, hava onglendingar gingið á odda hesum viðvíkjandi, men nú ætlar UEFA so at steðga hesum.

Keðiligt var eisini at síggja dystin millum Svøríki og Belgia, har hvørgin parturin megnaði at spæla nakran form fyri framrættaðan fótbólt.

At enda skal latast eitt lítið hjartasuff um dystin sunnukvøldið millum Noreg og Jugoslavia.

Greiða linjan, sum dómararnir hava lagt í endaspælinum varð nevnliga fullkomuliga neyðtikin í hesum dysti. Eitt reytt kort varð givið, men varð rætt borið at, var talið í minsta lagi trý. Vónandi verða ikki nógvir dystir afturat av tílíkum slag.